TILTØK

AA-fundur í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19 – (á loftinum, inngongd niðanfyri).

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

Javni
Skrivstovan er stongd vegna summarfrí. Ringjast kann til ein av nevndarlimunum.
Eirikur Dam, tlf. 422087
Jógvan Elias á Løgmansbø, tlf. 317686
Jarvin Feilberg Hansen, tlf. 320237
Malena Arnholdsdóttir, tlf. 441395
Diana í Puntabyrgi, tlf. 316510 – fax 310557
email: punta@post.olivant.fo

Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn
er opin mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri foreldur at børnum uttan ansing.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 13 og 17. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin mánadag kl. 14-18 og hósdag kl. 14-20. Teldupostur lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

Kvinnuhúsið svarar alt samdøgrið
á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

KRIS í Føroyum
Ráðgevingar og viðtalu telefonin er nú opin hvørt mánakvøld og hóskvøld á tlf. 458181 frá kl. 20-22. Møguleiki er eisini fyri at skriva beinleiðis til felagið á adressu: KRIS í Føroyum, boks 345, 700 Klaksvík.

Amnesty International
Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

Føroyskir fiskimenn
uttanlands, tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

MBF
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00. **Vit hava stongt vegna summarfrí frá 5. juli til 15. august.**
Tlf. 317373 · Fax 310813
e-mail: mbf@post.olivant.fo

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

Køliakifelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum:
Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

Giktafelag Føroya
Skrivstovan er stongd í summarfrítíðini. Lýst verður tá opið er aftur.

Nýrafelagið
Postsmoga 1063
110 Tórshavn.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á e-mail: thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

Føroya Astma/Allergifelag
MBF-húsið
Íslandsvegur 10c
Tlf./fax 311419

Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15.
Tlf. 31 79 59,
telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Teldupostur: fo.raadgivning@get2net.dk
Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum. Opið er: Mánadag, týsdag og hósdag kl. 11.30-15.30, mikudag kl. 14-18, fríggjadag stongt (donsk tíð).

PRÓGV

Súni Christiansen, Tórshavn, hevur lokið prógv sum civilverkfrøðingur í umhvørvistøkni við Aalborg Universitet.

Maja Akraberg Hansen hevur lokið prógv sum tvímálsligur siviløkonomur á Handilsháskúlanum í Árhus.

BRÚDLEYP

Í dag, 30. juni kl. 14.00 giftast í Vesturkirkjuni Judith Eysturtún Joensen og Jógvan Rubeksen, bæði úr Tórshavn.

Í dag, 30. juni kl. 14.00 giftast í prestagarðinum í Sandágerði Eyðhild S. Dam av Argjum og Herfinn Hansen úr Sørvági.

Í dag giftast Unn Andreasen, Haldórsvík og Hjartvard Hansen, Rituvík. Adr.: Signabøur.

Í dag, 30. juni kl. 16.00 giftast í Havnar kirkju Gitte Wernicke og Dávid Fjallsbak, bæði úr Havn. Veitslan verður í B36-húsinum fyri innbodnum.

Í dag giftast í Kastes kirke Gerda Jónsdóttir, Hósvík og Thomas Hensing, Keypmannahavn. Brúdleypsadr.: Nordborggade 4, 4tv 2100 København Ø.

Í dag kl. 15.00 giftast í Sandavágs kirkju Maria Ellefsen, Sandavágur og Jens Tummas Næss, Tórshavn. Veitsla verður í Argja Róðraneysti kl. 19.00 fyri innbodnum.

Í dag, 30. juni kl. 17.00 giftast í Fuglafjarðar kirkju Elsebeth Maria Abrahamsen úr Fuglafirði og Djóni á Boðanesi úr Havn. Veitslan verður fyri innbodnum í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00.

Í dag, 30. juni kl. 17.00 giftast í Kirkjubøar kirkju Guðrið Tórsheim og Jóannes Patursson. Veitsla verður fyri innbodnum í Kirkjubø kl. 19.00.

Leygardagin 7. juli kl. 14.00 giftast í ELIM í Søldafirði Lis Egholm, Fuglafjrður og Dánial Hansen, Glyvrar. Brúðarveitslan verður fyri innbodnum í John´s Restaurant, Saltangará kl. 18.00.

Leygardagin 7. juli kl. 14.00 giftast í Miðvágs kirkju Sólfríð Jacobsen og Bjørn Fjallsbak, Miðvágur. Døgurði verður fyri innbodnum kl. 17 og vælkomst verður kl. 21 í bygdarhúsinum í Miðvági.

Leygardagin 7. juli kl. 14.00 giftast í Tvøroyrar kirkju Turid Vang Jacobsen, Froða og Sakaris Frederiksen, Porkeri. Veitslan verður hildin fyri innbodnum í Gistingarhúsinum í Øravík.

Fríggjadagin 13. juli kl. 17.00 giftast í Leirvíkar kirkju Ann-Mari Heinesen, Leirvík og Jan E. Petersen, Klaksvík. Veistlan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.30. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, vera vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 443254, 456480 ella 252070 áðrenn 2. juli.

Leygardagin 14. juli kl. 16.00 giftast í Kunoyar kirkju Marita Wang Sigurðsson, Tórshavn og Jógvan Vilhelm, Kunoy. Vælkomst verður í Skálanumí Klaksvík kl. 19.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma, vinarliga sigi frá áðrenn 1. juli á tlf. 455168 ella 456811.

Hósdagin 19. juli kl. 18.00 giftast í Havnar kirkju Ingunn Ósk Eiriksdóttir, Lopra og Heini Weihe, Tórshavn. Veitslan verður fyri innbodnum í Havnar klubba kl. 19.30.

Leygardagin 21. juli giftast í Hvalbiar kirkju Elisabeth Norðberg Eið, Hvalba og Svein Eliasen, Tórshavn, búsitandi Viborg. Brúdleypið verður hildið í Roynhøllini kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin um at ringja tlf. 319917, 375295 ella 0045 87254758 innan 5. juli.

Leygardagin 21. juli giftast í Hósvíkar kirkju Birgit Christensen og Lars Bisgaard Kristensen, Hósvík. Vígslan verður kl. 16.00 og veitslan verður í bygdarhúsinum kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin um at ringja tlf. 422127, 422215 ella 220957 innan 11. juli.

Leygardagin 21. juli kl. 17.00 giftast í Sørvágs kirkju Tordis Nielsen, Sørvágur og Kim Lorenzen, Sønderborg. Tey, ið ætla at gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin at siga frá innan 7. juli á tlf. 332149 ella 321464.

Leygardagin 21. juli kl. 14.00 giftast í Havnar kirkju Sunrid Petersen, Argir og Leivur Ree Torvadal, Tórshavn. Veitsla verður fyri innbodnum Millum Gilja 89 Hoyvík, kl. 19.00.

Leygardagin 21. juli giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Finngerð Sólbjørg og James Forbes Clark, Luxemburg. Vígslan verður kl. 15.00. Veitslan verður á Hotel Norð, Viðareiði kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða okkum á hjúnabandsdegnum, verða vinarliga biðin um at siga frá helst áðrenn 9. juli á tlf. 456423 ella 452002.

Leygardagin 21. juli giftast í Hvalbiar kirkju Elisabeth Norðberg Eið, Hvalba og Svein Eliasen, Tórshavn, búsitandi Viborg. Brúdleypið verður hildið í Roynhøllini kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða vinarliga biðin um at ringja á tlf. 319917, 375295 ella 0045 87254758 innan 5. juli.

Leygardagin 4. august kl. 15.00 giftast í Havnar kirkju Gunnvør Olsen, Syðrugøta og Gunnar Oluf Weihe, Tórshavn. Veitslan verður hildin í Pálsstovu kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 310306, 441459 ella 313897, áðrenn 21. juli. Til ber eisini at tekna seg á teldupost: geo@post.olivant.fo

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

Hvør er Jesus?

Í kirkjunum verður í morgin prædikað yvir tey bæði líknilsini, sum standa at lesa hjá Lukasi evangelistur í 15. kapitli, versini 1-10: Líknilsið um hin burturmista seyðin og líknilsið um hin burturmista peningin. Hvat vildi Jesus við hesum smásøgum? Millum annað vísa okkum, hvørið hann er. Tí segði hann tey á fyrsta sinni.

Har eru nakrir farisearar og skriftlærðir, sum knarra og skelda og eru misnøgdir um, at Jesus fagnar syndarum og etur saman við teimum. Tað kemur ikki væl við hjá hesum lógtrúgvu jødum, at allir tollarar og syndarar halda seg nær at Jesusi fyri at lýða á hann. Teir skilja bart út ikki Jesus, hann eins og minkar í virði í eygum teirra. Heldur enn at geva seg í orðaskifti við teir, velur Jesus at svara teirra undran og ábreiðslu við líknilsum. Við teimum kann kann lýsa sitt kall og sín gerning, við teimum kann hann gera farisearunum tað greitt, hví hann er teirra millum, hví hann yvirhøvur er komin til jarðar.

Vit hava lært at kalla Jesus okkara frelsara. Men hava vit eisini gáað um, hvat hetta navnið ber í sær:
- av kærleika og umsorgan
- av ósjálvsøkni og offurvilja
- av sorg og líðing?

Liknilsini hjálpa okkum til at síggja eina mynd av Guðs soni, sum kom til jarðar fyri at frelsa okkum. Sum ikki spardi nakað, sum ikki gavst á hondum, men fullgjørdi frelsuverkið. Tað skotska skaldið Elisabeth Clephane hevur sæð myndina av tí krossfesta í líknilsinum um seyðamannin, sum gongur um fjøllini og leitar, til hann finnur seyð sín, og um konuna, sum tendrar ljós og sópar húsið og ongan ómak sparir, til hon finnur drakmu sína. Hoyrið bara, hvussu skaldið syngur:

Men eingin av teim bjargaðu veit,
hvør torfør var henda ferð,
ei heldur, hvat hirðin leið og sleit
í síni frelsaragerð.
Hann leitaði dag, hann leitaði nátt,
í djúpum gjáum, í homrum hátt.

Og hyggið, har gjøgnum alt skursl og grót,
har liggur ein blóðug slóð;
tí steinar skóru hans hond og fót,
so blóðsporið eftir hann stóð!
Við úlvin so grimliga bardist hann,
so hjartablóðið hans tað rann.

Við báðum líknilsunum letur Jesus farisearnar og okkum við síggja, hvørið hann er. Hvørið frelsaragerningur hansara er: at menniskjusonurin er komin at leita upp hitt farna og bjarga tí. At hann er hin góði hirðin, sum setur lív sítt til fyri seyðirnar.

Jákup Reinert Hansen

JUNGLUTRUMMU-SLÁARAR SØKJAST ...

Vit eru eitt vælvirkandi orkestur við nógvum spennandi uppgávum, men okkum tørvar tveir nýggjar junglutrummusláarar - gjarna við royndum - at byrja skjótast gjørligt.
Við hvørt spæla vit andante, men sum oftast er tað full ferð á kassanum.
Um tónaartin er PC ella Mac er ikki áhugavert. Samljóð og kreativitetur eru tað harafturímóti!

Um tú ert før/ur fyri at arbeiða sjálvstøðugt, ert kreativ/ur og før/ur fyri at framleiða væl og skjótt og kanst svara játtandi upp á minst tríggjar av útsøgnunum niðanfyri, so ert tú kanska rætti persónurin:

- ❑ Eg dugi væl at brúka InDesign ella QuarkXpress
- ❑ Eg dugi væl at brúka CorelDraw Adobe Illustrator ella FreeHand
- ❑ Eg dugi væl at brúka PhotoShop
- ❑ Eg dugi væl at brúka DreamWeaver
- ❑ Eg dugi væl at arbeiða við 3D og video

Heldur tú teg hava staðið royndina og hevur tú hug at gerast partur av einum góðum orkestri, so skalt tú ikki ivast, men skriva eina umsókn í stundini ella í seinasta lagi 10. juli 2001 og senda hana saman við viðmæl-um og dømum um gjørdar uppgávur til adressuna niðanfyri.
Lønina tosa vit um, og er okkurt annað, tær tørvar at spyrja um, kanst tú ringja tel 316511 og spyrja eftir Johnny Gaard, stjóra.
Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

team85 • 150511

85 team

Hoyviksvegur 59, Postboks 3138, FO-110 Tórshavn
Tel 316511, Fax 310390, www.team85.fo, jg@team85.fo

Team 85 er reklamuvirki við 10 starvsfólkum. Kundar okkara eru fyrítøkur í privata vinnulívinum og stovnar, m.a. Agip Faroe Branch, Atlantic Supply Base, Ferðaráð Føroya, Föroya Bjór, Føroya Shell, Føroya Sparikassi, FøroyaTele, Kloosterboer, LM-Handilin, Løgmansskrivstovan, Menningarstovan, North Atlantic Fish Fair, Smyril Line, Tórshavnar kommuna, Vónin o.m.a. Umframt vanligt reklamuvirksemi framleiðir Team 85 eisini sjónvarpslýsingar, og í beinleiðis sambandi við teknistovuna hevur Team 85 framkomna verkstovu, har framleidd verða lýsingaskeltl, framsýningabásar, bilprýðilingar, bussýsingar, útprent í stórum støddum v.m.

Toll- og Skattstova Føroya
Streymoyar Øki

Størv leys at søkja

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar Øki, eru hesi størv leys at søkja:

Posttolldeildin: Eitt avloysarastarv niðursetta tíð til setan umleið 1. september og eitt ár fram, og eitt fast starv fulla tíð.

Í báðum førum umfatar starvið kannan og edv viðgerð av tollingaráheitanum og annað arbeiði í sam-bandi við tollavgreiðslu.

Umsøkjarar við royndum innan tollarbeiði hava fyrimun.

Kassin á Tollbúðini: Eitt fast starv fulla tíð sum hjálparfólk við kassan. Arbeiðsuppgávur: Vanligt kassaarbeiði, inn- og útgjøld umframt annað arbeiði í samband við kassan. Umsøkjarar við kunnleika til kassa/avgreiðsluarbeiði hava fyrimun.

Virkiseftirlitsdeildin: Eitt fast starv fulla tíð. Arbeiði umfatar málsviðgerð og eftirlit innan skatt, toll og avgjøld. Ynskjandi er, at umsøkjarar hava í minsta lagi HH prógv e.l. og hava viðkomandi útbúgving og royndir innan umsiting.

Skattadeildin: Eitt fast starv fulla tíð. Arbeiðsuppgávan umfatar partafelags/roknskapar-líkning, eftirlit og annað arbeiði í hesum sambandi. Ynskjandi er, at umsøkjarar hava í minsta lagi HH prógv og royndir innan roknskapararbeiði.

Toll- og Skattstovan bjóðar starvsfólkunum ymsar innanhýsis útbúgvingar. Møguleiki er eisini at útbúgva seg uttanhýsis við ávísum stuðli frá stovninum. Kravt verður, at viðkomandi, ið settur verður, luttekur í øllum viðkomandi innanhýsis útbúgvingum, og helst eisini í viðkomandi uttanhýsis útbúgvingum.

Løn og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið. Lønin verður ásett eftir útbúgving og viðkomandi starvsroyndum.

Setanarøkið fevnir um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir hennara, og tann, sum settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

Nærri frágreiðingar um størvini fáast við at seta seg í samband við Eyðfinn Hansen, tlf. 310260.

Størvini verða at seta august/september í ár, og skrivlig umsókn saman við avriti av prógvum, ummælum v.m. skulu sendast til

Toll- og Skattstovu Føroya
Streymoyar Øki
Postboks 3139
110 Tórshavn

innan 25. juli 2001.

Uppsetan og skipan av barrum

Til:
Brúdleyp
Kundar føðingardagar
Starvsfólkaveitslur
Arsveitslur
Receptiónir og tilikt

Hans á Lag Sp/f
Tlf. 21 93 83
hanslag@post.olivant.fo

Sosialurin 311820

HAVNAR BIO
Tlf. 3119 56

Undanfrumsýning
Leygardagin 30.06. kl. 23⁰⁰
(Frumsýning 14.09.)

Leygardagin 30.06. kl. 23⁰⁰
Sunnudagin 01.07. kl. 22⁰⁰

Undanfrumsýning
Sunnudagin 01.07. kl. 22⁰⁰
(Frumsýning 06.07.)

Leygardagin 30.06. kl. 20⁰⁰
Sunnudagin 01.07. kl. 19⁰⁰

Leygardagin 30.06. kl. 21⁰⁰
Sunnudagin 01.07. kl. 20⁰⁰

www.in.fo/havnarbio